## DAGSINS MEINING

# Fyrilit

Henda tíðin upp undir jól er ein sera strongd tíð. Øll hava skund og strongdin bara veksur fyri hvønn dag. Hetta er eisini ein sera myrk tíð og sýnið á vegnum er mangan sera vánaligt. Hetta er eisini ein tíð, tá nógv hendir, sum ikki átti at hent, og hetta er ein tíð, har mangan álvarsamar vanlukkur henda. Í staðin fyri at leika so í og at latið okkum strongja, so áttu vit øll at lært okkum at tikið tað heila eitt sindur meira róliga.

Vit eiga fyrst og fremst at sýna fyrilit í ferðsluni. Mangan er hált hesa ársins tíð, og so er uppaftur meira orsøk til sýna fyrilit.Tað vístu vit eisini á í vikuskiftisblaðnum, og tað kann ikki endurtakast ov oftani. Vit kundu eisini spurt okkum sjálvi, hví ið vit leika so í. Hvat er tað vit hátíðarhalda hesar dagarnar? Vit hátíðarhalda jú eina friðarhátíð, sum er til minnis um heimsins frelsara, sum kom við friðarboðum til menniskjuni. Tað er tí nakað løgið í hesum, at vit gera so nógv burtur úr øllum, sum ikki beinleiðis hevur við jólaboðskapin at gera. Her eiga vit øll at steðga á og hugsa okkum um.

Men eisini avvarandi myndugleikar eiga at hugsa seg um og at sýna ábyrgd. Løgreglan eigur at vera sjónlig og lands- eins væl og kommunalir myndugleikar eiga at gera nógv meira til tess at gera ferðsluna tryggari hesa tíðina. Tað eru ávís støð, serstakliga í høvuðsstaðnum, har fólk og serstakliga børn eru í stórum vanda. Skúlar og barnagarðar standa við høvðusvegir við nógvari ferðslu. Bensinstøðir standa beint yvir av ella við síðuna av skúlum og dagstovnum. Sjálvt um gonguteigar eru, so eru hesi støðini ofta illa upplýst og er hálka, so kann vandi vera á ferð. Her er enn langt á mál, áðrenn vit kunnu siga, at nú eru skúlavegirnir tryggir. Men vit eiga eisini fyri okkara egnu skuld at ansa okkum betur. Um vit læra at taka tað meira róligt, so kunnu vit ivaleyst njóta jólafriðin og jólaboðskapin betri saman við børnum og øðrum. Men latum okkum øll fram um alt sýna fyrilit úti sum heima – á arbeiðsplássum á sjógvi og landi og ikki minst í ferðsluni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Børn nýta ikki endurskin!

**Geir Wardum**



Eg haldi ikki, at tað eru børnini, ið eru tann størsti trupulleikin við ikki at nýta endurskin. Eg koyri børnini hjá okkum hvønn morgun oman forbí viðarlundina í Havn í Kommunuskúlan, har síggi eg lærarar og vaksin bæði til gongu og á súkklu sum ikki hava endurskin ella ljós á súkkluni. Tey vaksnu fólkini í dag keypa næstan altíð myrkar jakkar (svartar ella onkran myrkari lit fyri at fjala teirra yvirvekt) og tey hugsa ikki um at koyra endurskin upp á klæðini.

Um dagin og kvøldarnar, tá ið myrkrið fellur á, sæst eisini ofta, at rennararnir renna uttan endurskin, og helst eru tey í myrkum klæðum fyri at fjala eitthvørt.

Tað eru ikki børnini, ið eru tann størsti trupulleikin. Nei, tey vaksnu skuldu fyrst og fremst tikið seg saman, og so kundu børnini lært av teimum.

# Sig sum er Kári P. Højgaard

**Carl August Arge**
*x-limur í Sjálvstýrisflokkinum*



Kári P. Højgaard sigur í Útvarpinum, í viðmerking til at so nógv fyrrverandi valevni hava melda seg úr Sjálvstýrisflokkinum - seinast eg sjálvur, at hann skilur ikki mína útsøgn um, at so lítið orðaskifti hevur verið í flokkinum um eym mál. Hann segði, at málið um bann móti diskriminatión vegna kynsliga orientering »hevur verið høvuðsevnið innanfloks tey seinastu tvey árini«.

Harvið sigur hann meg siga ósatt.

Eg tími sera illa at keglast um tílíkt, men eg vil ikki av órøttum vera sagdur at fara lætt um sannleikan. Tí hesa viðmerking.

Far inn á heimasíðu flokksins www.sjalvstyri.fo. Hygg undir »Greinar«. Har standa allar útmeldingar, flokkurin hevur gjørt seinastu árini. Eisini útmeldingarnar frá seinastu landsfundunum. Har verður ikki við einum orði nevnt nakað um tað, Kári P. Højgaard sigur hevur verið »høvuðstemaið seinastu tvey árini«.

Rætt er, at evnið hevur verið frammi. Men tað hevur verið tí at onkur av okkum, sum í dag ikki longur eru limir, hava reist málið undir skrápunktinum »Ymiskt«. Leikluturin hjá Kára P. Højgaard hevur verið at royna at tiga málið burtur.

Rætt skal vera rætt.

# Opið bræv til Hans Paula Strøm

**Leila Solmunde**
*Formaður í MBF*



MBF vil við hesum skrivið heita á Landsstýrismannin um at bera so í bandi, at stovnurin fyri fjølbrekað børn verður tikin í nýtslu sum ætlað 1. januar 2006.

Síðani vilja vit heita á landsstýrismannin, at brúka tíðina fram til 1. apríl 2006, til at finna útav hvussu hesi viðurskifti eiga at skipast, hesum børnum at gagni.

Er ætlanin at ansingin av fjølbrekaðum børnum skal verða ein landsuppgáva burturav, so má Almanna- og heilsumálaráðið seta pening av til serstovnar til hesi børn, og heimild fáast fyri at reka tílíkar stovnar.

Fær kommunan ábyrgd av einum dagtilboði til øll børn, og landið bert skal gjalda fyri ta meirútreiðslu sum stendst av brekinum, verða øll børn líka fyri lógini, óansæð hvar í landinum tey búgva.

MBF er av tí fatan, at øll hava sama rætt til ansing í kommununi, og at foreldur at børnum við breki skulu gjalda sama gjald, sum onnur foreldur. Meirkostnaðurin av hesum ansingartilboði eigur landið at gjalda fyri. Hetta vil gera øll børn líka fyri lógini, og øll fáa sama rætt.

At vit hava fleiri skipanir kann gera, at nøkur børn detta niðurímillum í lógarverkinum, og er hetta dømi sum nú er íkomið, eitt tekin um, at fjølbrekað børn ikki fáa tey tilboð, sum teimum var ætlað, tá avgerð varð tikin um at gera hetta stovnstilboðið.

Eitt vælvirkandi samstarv millum kommunur, ráð, stovnar og foreldur er ein fyritreyt fyri at tilboðini hjá hesum børnum skulu virka væl og ikki enda í einum trætumáli um, hvør hevur ábyrgd av hvørjum.

Tað er ein tapari í hesum máli, og tað eru tey fjølbrekaðu børnini og foreldur teirra. Tí er okkara vón, at málið verður avgreitt sum skjótast, so hesi børn kunnu byrja á einum góðum og egnaðum dagstovni 1. januar 2006.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.